# Frá Kommunulæknafelag Føroya

*Tíðindaskriv*

Almanna- og heilsumálastýrið og Kommunulæknafelag Føroya hava undirskrivað nýggjan setanarsáttmála fyri kommunulæknar. Hesin sáttmálin avloysir gamla sáttmálan við Ríkisumboðið og tekur støði í kommunulæknalógini frá 1999.

Nýggi setanarsáttmálin er galdandi frá 1. apríl 2000 og lúkar tey krøv, sum kommunulæknafelagið í løtuni metir eru rímulig.

Í nýggja setanarsáttmálanum hava vit mist rættindi til fría íbúð og onnur rættindi, sum vit høvdu í gamla sáttmálanum. Kommunulæknafelagið hevur lutvíst fingið endurgjald frá Føroya landsstýri fyri hesi mistu rættindi.

Eftirútbúgving av kommunulæknunum er neyðug fyri at kommunulæknarnir framhaldandi kunnu veita eina nøktandi heilsutænastu til borgararnar.

Kommunulæknafelagið ásannar, at Føroya landsstýri hevur tikið sín part av ábyrgdin við at viðurkenna eftirútbúgvingartørvin og at fíggjarliga stuðla eftirútbúgvingini av kommunulæknunum.

Landskassin rindar eina grundupphædd til hvønn kommunulækna. Henda grundupphædd kann nú vera ymisk frá læknadømi til læknadømi og betrar hetta um møguleikan at fáa ósett størv sett. Setanarsáttmálin gevur nú møguleika fyri at kommunulæknar deila sítt kommunulæknastarv við annan lækna eftir samráðingum millum kommunulæknafelagið og Almanna- og heilsumálastýrið.

Til setanarsáttmálan er eisini undirskrivað eitt protokollat, har partarnir eru samdir at seta eina nevnd, sum skal kanna møguleikarnar fyri at fáa í lag eina meira nútímans vaktarskipan. Nevndin skal eisini koma við tilmæli um vaktarskipan og vaktarviðurskifti í økjum, har fáir kommunulæknar eru.

# Sands kommuna hevur keypt »Barnagarðin á Teigunum«á Sandi

*Tíðindaskriv*
*Á Sandi 30 okt. 2000*

Barnagarðurin á Teigunum varð fyrireikaður og bygdur av privatpersónum í einum tíðarbili, har Sands kommuna hvørki hevði tøkan pening ella lánimøguleikar til at eina verkætlan av slíkum slagi.

Sands kommuna hevði í skrivi til eigararnar, sagt seg vilja fyrireika sjálvsognarstovn, sum skuldi leiga Barnagarðin á Teigunum. Seinni vísti tað seg at vera trupult at koma ásamt um røttu leiguupphæddina. Ikki minst tí partarnir vóru grundleggjandi ósamdir um hvørt eigararnir skuldu reka útleigaðu ognina við undirskoti, ella ikki.

Samstundis er fíggjarliga støðan hjá Sands kommunu batnað, og greiða ynski hjá kommununi hevur nú verðið at keypt Barnagarðin á Teigunum. Á henda hátt metir kommunan seg at spara pening og kemur sjálvandi eisini at eiga barnagarðin eftir eitt ávíst áramál.

Eigararnir, sum síggja lítla meining í at eiga ein barnagarð ið ikki verður brúktur til endamálið, eru tí gingnir við til at selja barnagarðin fyri 1,5 mió.kr.

Á henda hátt vóna báðir partar at hava loyst málið um Barnagarðin á Teigunum, á ein hátt sum gagnar øllum í bygdini. Allarmest børnunum, sum eftir ætlanini sleppa í barnagarð undan jólum.

Virðingamest
*Eyðun Viderø, Sands Kommuna*
*Páll á Reynatúgvu, Sp/f Partú*

## VIÐMERKINGAR

# Uppgávan at skapa trivna fyri øll



**Hendrik Thomsen**
*valevni Javnavarfloksins*

Uppgáva Býráðsins er millum annað at skapa trivna fyri borgaranar allar.

Fyri børnini so tey kunnu vera trygg, tá samfelagið hevur boð eftir foreldrunum til arbeiðis.

Fyri teimum ungu, so tey kunnu fáa útbúgvingar og búðstaðarmøguleikar, sum svarar til tíðarinar krøv.

Fyri teimum, sum eru á arbeiðsplássunum og bera samfelagsins byrðar.

Fyri teimum gomlu, sum ikki arbeiða meira.

Fyri teimum, sum av eini hvørjari grund blivu sett uttanfyri, og sum eingin sýnir áhuga fyri.

Fyri øllum hesum samfelagsbólkum skal tað verða rúm fyri. Tað er uppgáva teirra fólkavaldu at skipa so fyri, at eingin verður gloymdur. Hvussu náa vit hesum máli er væl tann stóri spurningurin.Tað verður helst ikki rúm fyri at koma við uppskotum til allar loysninar í hesi grein, men i komandi greinum vilja onnur uppskot koma.

(Børnini). Tað vísur seg at vera ein stórur tørvur á at fáa børn í barnagarð og vøggustovu. Tað verða bygdir stovnar, og aðrar loysnir verða royndar. Men tørvurin bert veksur. Kanska eru tær framdu loysnir ikki nøktandi einsamallar.

Tað hjálpir ikki bara at demma fyri, trykkið má takast av á annan hátt. Ásannandi at tað sjálvandi skal standa einum og hvørjum barni eitt trygt ansingarpláss í boði, vildi tað hjálpt munandi, um foreldrafarloyvistíðin bleiv longd upp í 2 ár, hetta krevur sjálvandi eisini vælvild frá landspolittikarunum.

Farast má eisini undir at skapa møguleikar fyri bygging av húsum og íbúðum, sum fólk kunnu búgva í, uttan at bæði foreldurini, skulu verða trælir hjá pengingastovnunum meginpartin av lívinum. Og hvørki hava ráð ella tíð til síni egnu børn.

# Býráðspolitikkur og fullveldi

**Hildur Eyðunsdóttir**
*valevni hjá Tjóðveldisflokkinum*



Tað er náttúrligt at vit krevja ábyrgdarfullar landspolitikkarar, men tá talan er um kommunalpolitikk tykist hugburðurin at verða ørðvísi. Í degi og viku nú eitt kvøldi var spurt um týdningin av kommunalpolitikki, og eg skilti á teimum spurdu at tað var mest ein spurningur um kantsteinar og snøggar gøtur, og her í Havn kanska heldur um bíðilistar. Førdi politikkurin í kommunum hevur stóran týdning fyri hvussu vit liva í hesum landi. Hetta hevur serliga stóran týdning nú vit stýra móti fullveldi. Eg ynski fullveldi og ynski at tjóðin mennist og sleppur at virkja javnbjóðis aðrar tjóðir. Men skal tað eyðnast til fulnar, er eisini neyðugt at vit hava ein góðan høvuðsstað sum gevur trivna til allar borgarar. Hetta vanliga valstríðið har valevni lova at kroysta okkurt hissini mál ígjøgnum sum er frammi í tíðini gevi eg ikki nógv fyri, tí vit kunnu øll rokna út, at við avmarkaðari fíggjarorku og íløgukarmi fáa vit ikki bæði stovnspláss til øll, nóg nógvar eldraíbúðir, íbúðir til ung lesandi, ítróttarhallir o.s.fr pluss øll hini vallyftini í einum valskeiði. Í hvussu er ikki við nøktandi góðsku. Vit kunnu gera neyðloysnir sum tildømis at skrumbla eitt stadion ígjøgnum líkamikið hvussu tað sær út, tí nøkur rópa serliga hart, men hvørjum tænir hetta í longdini?

### Hugsjónir

Vit eiga at seta okkum stór mál, hava hugsjónir og verða opin og frísint, fyri at lyfta býðin og bygdirnar sum eru við í kommununi upp á eitt hægri mentanarligt og vinnuligt støði.

Tí haldi eg vit eiga at leggja langtíðarætlanir fyri best møguliga høvuðsstaðnum, har hugsað verður um heildina og raðfesta hagani.

### Kommunalpolitikkur á hægri støði

Fleiri og størri uppgávur verða lagdar út til kommunurnar at umsita og at hava ábyrgdina av. Kommunurnar verða færri og størri, og tað er tí átrokandi neyðugt at kommunalpolitikkurin kemur upp á eitt hægri støði.

Tórshavnar Kommuna hevur sum størsta kommuna í landinum, og við størstu fíggjarorku, eina serliga skyldu at vísa ábyrgd og at ganga undan í kommunumálum og framtíðar kommunalpolitiska arbeiðslagnum. Kommunalpolitikkarnir eiga saman við landspolitikkarunum at byggja land til frama fyri okkum øll.

# Kann Postverk Føroya fara í gjaldssteðg?

**Súsanna Dam**

Hvør einasti dagur ber nýggj tíðindi um, hvussu Føroya Løgting lóggevur seg frá sínum ábyrgdum, fíggjarligum eins og øllum øðrum.

Í hesum sambandi havi eg nakrar sera nærliggjandi og viðkomandi spurningar viðvíkjandi Postverki Føroya.

Eingin peningur er settur av á fíggjarløgtingslógini til hetta góða postverk, og tað er so sjálvandi, tí tjóðveldismenn yvirtóku í sínari tíð postverkið, tí teir mettu tað eina megnar inntøkukeldu. Sum øllum kunnugt, mistóku teir seg eisini har, uttan teir tó hava átikið sær ábyrgdina av skeivleikanum.

So til spurningarnar.

Hvørja trygd havi eg fyri míni inniogn á girokonto?

Hava vit sum viðskiftafólk nakra sum helst trygd fyri, at tann peningur vit lata postverkinum til víðari avgreiðslu kemur í hendi á rætta móttakara, um so skuldið verið, at postverkskassin gerst tómur?

Vildi fíggjarmálaráðharrin mælt fólki til at flyta pening sín burtur av postgirokonto?

Kann Postverk Føroya fara í gjaldssteðg?

Av tí at mong okkara hava sera dýrt keyptar royndir, hevði verið hóskiligt, at hesir spurningar verða svaraðir á slíkan hátt, at almenningurin fær høvi til at kunna seg um viðurskiftini.





## VIÐMERKINGAR

# Er formaðurin í Uttanlandsnevndini við síni fullu fimm?

**Heðin Mortensen**
*næstformaður í Uttanlandsnevndini*



Væl veit eg, at Hergeir Nielsen ringdi alt Amerika runt, fyri at finna Jenis av Rana, so at hann kundi koma yvir til Danmarkar sum fjórði limur í uttanlandsnevndini. Alt hetta, fyri at okkara fornermaði formaður, Hergeir Nielsen kundi sleppa til tað landið, sum hann ikki á nakran hátt kann sameinast við?

Tað er Hergeiri Nielsen so líkt at siga eini ósannindi nóg ofta og so halda at fólkið til endans trýr tí, sum hann sigur. Seinasta dømið um hetta, er »frágreiðing« hansara um arbeiðið í Uttanlandsnevndini. Her roynir Hergeir at lýsa andstøðuna á tingi (við undantak av »tí seriøsa Miðflokkinum«) sum fólksins fíggindi.

Tað má sigast at vera løgi, at eitt landsstýri fer at samráðast um nakað, sum fólkið í landinum ikki vil hava, og við á ferðini, eru nakrir fornermaðir løgtingsmenn, sum treiskast ímóti meirilutanum í uttanlandsnevndini, og so skulu hesir útnevna hvør er fólksins fíggindi.

### Gongdin í arbeiðinum

Gongdin í málinum er handa, harra Hergeir Nielsen:

Fundur bleiv ásettur í Uttanlandsnevndini týsdagin 24. oktober kl. 8:15, har løgmaður saman við politikarum og embætisfólki greiddi frá fundinum við Frank Jensen, og uppleggið til samráðingar við donsku stjórnina.

Løgmaður saman við fylgi fór av fundi kl. 9:50.

Tá ið ikki meira hesum viðvíkjandi var á skránni, spurdi undirritaði nær í næsti fundur bleiv og hvar. Eisini bleiv spurt av undirritaða um ætlanin var at uttanlandsnevndin skuldi við til Danmarkar.

Aftaná henda spurning kemur spakuliga fram úr formanninum, ja, tað helt hann vera rímiligt.

Um formaðurin í uttanlandsnevndini ætlaði at nevndin skuldi við til Danmarkar, so hevði hann vita í mánaðar nær fundurin við donsku stjórnina skuldi verða. At koma úr skímaskoti við ringari samvitsku yvirfyri nevndini, og siga nakrar fáar tímar áðrenn fráferð, at fundur bleiv í Danmark, ja tað má kallast planlegging við lít. Hvat hava vit so í vænti av hesum monnum, sum ætla at slíta okkum úr ríkisfelagsskapinum fyri einhvønn prís?

Fýra av limunum í uttanlandsnevndini boðaðu beinanvegin frá, at teir komu ikki at verða til staðar til fundin í Danmark. Grundgevingin var hin sama sum seinast, at fundarstaðurin hjá uttanlandsnevndini er í Føroyum, og at løgmaður kunnar nevndina so skjótt sum hann kemur heimaftur.

Tað bleiv ført inn í gerðabókina, at nú hevði formaðurin hervið fingið fráboðan um at ikki bar til at seta fund í Keypmannahavn.

### Til Danmarkar at venda

Kortini hevur formaðurin, ímóti øllum rættindum, sett fund at verða í Statsministeriinum hósdagin 26. oktober kl. 13:30. Uttanlandsnevndin hevur ikki heimild at luttaka í sjálvum samráðingunum, og hon kann heldur ikki halda innanhýsis fund, tí hon er undirmannað. Ella sagt við øðrum orðum: Uttanlandsnevndin er farin til Keypmannahavnar fyri at staðfesta, at eingin fundur verður.

Við á ferðini er ein tingmaður úr Miðflokkinum, sum ikki er limur í uttanlandsnevndini. Hesin umboðar tað, sum Hergeir Nielsen kallar »tann seriøsa partin av andstøðuni«. Sambært tingskipanini, hevur hesin (um hann kemur á fund) ikki loyvi at taka orðið, ella at síggja- ella fáa útleverað tilfarð, sum verður lagt fyri fundin. – Jú sanniliga ljóðar hetta seriøst.

Løgtingsskrivstovan hevur ikki sent ráðgeva ella skrivara við til Danmarkar, og ferðaseðlar, hotel og aðrar útreiðslur verða ikki goldnar av løgtinginum. Hesir løgtingsmenn eru við formanninum í uttanlandsnevndini á odda farnir við til samráðingarnar sum privatpersónar. Spurningurin er so, um allir føroyingar (einir 50.000 í tali) kunnu møta upp næstu fer?

# Gloymið ikki útjaðaran



**Absalon Matras**
*valevni á sambandslistanum*

Vit hava seinastu tíðina hoyrt nógv um útjaðaran. Vit eiga at ansa eftir, at ikki alt endar í høvuðsstaðarøkinum, meðan bygdirnar spakuliga doyggja út.

Tað gleðir meg, at Sambandsflokkurin hevur lagað tað so, at fólk sum búgva í útjaðaranum í kommununi eisini eru við á listanum til býráðsvalið.

Sum búgvandi í hesum økjum kunnu vit so gera vart við viðurskifti á staðnum, eins og í kommununi annars, til frama fyri allar borgarar í kommununi.

### Koyrivegurin

Í nøkur ár hevur verið arbeitt uppá vegin millum Klaksvík og Norðoyri. Vegurin er breiðkaður nógv, og er tað nú ein fragd at koyra eftir honum. Men enn manglar nakað í áðrenn vegurin er komin heilt út til gomlu bygdina, sum ætlanin er.

Tað hevur sum kunnugt gingið ógvuliga seint við Oyravegnum. Mær er sagt, at orsøkin til tað er, at peningur ið var settur av til endamálið er fluttur og brúktur arðastaðir. Um so er, eigur kommunan at mótmæla, at slíkt fer fram.

Sum kunnugt er vegagerð millum bygdir ikki kommunumál, men landsmál. Men hóast hetta eigur komandi býráð at streingja á landsmynduleikarnar, fyri at fáa Oyravegin gjørdan lidnan.

Saman við vegnum fær bygdin eisini nýggja vatnveiting. Hetta síggja vit fram til, tá verandi vatnveiting ikki er nøktandi.

### Spælipláss

Tað eru alt ov fá spælipláss í kommununi. Hóast fleiri útstykkingar eru gjørdar seinnu árini, hevur ikki verið hugsað um spælipláss og harvið trivnaðin hjá børnunum. Spæliplássini í Klaksvík eru gomul, og tí búgva mest eldri fólk, har hesi eru. Úrslitið er, at børnini spæla á koyrivegnum til stóran ampa fyri ferðsluna, og foreldrini kenna seg eisini sera ótrygg við støðuna.

Norðoyri er ikki nakað undantak í so máta. Fleiri nýggj hús eru bygd og ungar familjur fluttar til. Harafturat eru dagrøktarmammur úti á Oyri, sum ansa børnum úr Klaksvík. Men spælipláss er einki.

Eg meini, at tá kommunan fer undir nýggjar útstykkingar, so eigur spælipláss at vera ein náttúrligur partur av hesum arbeiði. Eitt spælipláss ger ikki eina útstyikking nevnivert dýrari. Tað sum skal til, er at slætta eitt øki og hegna tað inni. Restina kunnu børn og vaksin byggja upp yvir eina tíð.

Annars er at fegnast um alt tað virksemi, ið vit hava í dag og sum gevur vaksandi inntøkur til kommununa.

Vit eiga at minnast til, at tað skulu breiðir herðar til at bera góðar tíðir, og her vilja vit á sambandslistanum leggja rygg til.

# Teir yngru og eldru borgararnir



**Andras L. Samuelsen**
*Valevni til Tórshavnar býráð*

Hvat kanst tú geva av íblástri til Tórshavnar kommunu, spyrji eg meg eftir at hava játtað at verða valevni til býráðið fyri Sambandsflokkin.

Eg fari at átaka mær hesa ábyrgd við vanligum skynsemi, og royna tað eg kann fyri at okkara skattakrónur verða nýttar á ein tílíkan hátt, sum koma øllum borgarum tilgóðar; tó skulu teir yngru og eldru borgararnir setast fremst, tí gongur teimum væl, gongur eisini okkum væl.

Niðanfyri nevndu mál vil eg tí frammarlaga av verkum at fremja:

**1. Dagføring av fólkaskúlunum.**

1 Fólkaskúlalógin krevur nýggjar og øðrvísi arbeiðshættir, sum hølini ikki lúka. Kommunalu fólkaskúlarnir eiga tí at bjóða næmingunum betri og rúmligari hølisviðurskifti, soleiðis at skúlarnir gerast eitt betri arbeiðspláss hjá børnunum og teimum ungu at búleikast í; eitt stað har tey ikki bara læra, men eisini trívast væl., Fólkaskúlarnir mugu tí út- og umbyggjast.

**2. Útbygging av dagstovnum.**

1 Eitt mál, sum nývalda býráðið má loysa skjótt, eru umstøðurnar hjá teimum yngstu, sjálva byrjanina í kommununi. Tað er ikki rætt, um munur er á, nær tú ert føddur, eitt ár við bíðilista til dagstovn og dagpleygu, ella eitt ár við ongum bíðilista. Tað eigur at vera ein rættur hjá smábørnum at sleppa á dagstovn ella dagpleygu, um so foreldrini ynskja tað av námsfrøðiligum ella fíggjarligum ávum.

**3 Býráðið skal gera ein itøkiligan eldrapolitikk.**

1 Teir eldru borgararnir verða fleiri og fleiri. Tað er umráðandi, at kommunan býður eldru borgarunum í kommununi fjøltáttaðar møguleikar. Eldri borgarar, sum ynskja tað, skulu hava valmøguleikar at búseta seg t.d. í íbúðum, sambýlum ella á ellisheimum.

**4 Tórshavnar kommuna eigur at geva teim ungu fjøltáttaðar avbjóðingar.**

1 Kommunan stendur á gáttini til ein umfatandi vøkstur. Møguleikin fyri eini stórbýarmentan er skjótt at hugsa. Býráðið eigur at fara virkið inn at fyribyrgja ungdómsbrotsverkum. Hetta kann gerast við at vísa vælvild til aðrar møguleikar fyri tey ungu. T.d. samverustað fyri ung undir 18 ár; koyribreyt til súkklu, prutl, motorsúkklu og bilar; klintriveggir undir skipaðum viðurskiftum.

**5 Ferðsluviðurskiftini skulu lagast eftir einum stutttíðar- og langtíðarpolitikki.**

1 Borgarar skulu kunna ganga tryggir, eisini í regni, mjørka, vindi og hálku. Bilferðsluruðuleikar skulu loysast skjótt, tí ferðsluóhapp bíða ikki eftir loysnum.

1. januar leggja Kollafjarðar og Tórshavnar kommuna saman, og er hetta sostatt fyrstu ferð at borgarar í Kollafirði, Signabø, Oyrareingjum, Tórshavn, Hoyvík, Argjum, Kaldbak, Hvítanesi, Norðadali, Kaldbaksbotni, Syðradali, Sundi og Mjørkadali skulu velja umboð í Tórshavnar býráð. Í einari kommunu eiga borgarar at hava somu rættindi og skyldur. Hetta verður ein stór avbjóðing fyri komandi býráð at fara undir.

Eftir mínum tykki eigur Tórshavnar kommuna, sum tann størsta og við høvuðsstaðnum, at vera fyrimynd, fyrst og fremst við barna-, ungdóms- og eldrapolitikkinum.